


www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 08 - 2012

# Norska Cecilie - Guðrun-troyggja besta oljugávan

Tað var ein ovurfegin Cecilie Haarriis úr Stavanger, sum fekk uppringing frá Margretu Jacobsen á føroyska básinum á oljumessuni í Stavanger á middegi í dag. Hon hevði vitjað føroyska básin dagin fyri og har latið inn sítt visitkort fyri at kunna vera við í lutakastinum um eina av kendu og vøkru troyggjunum hjá Guðrun & Guðrun. Tá eg fekk eygað á hasa troyggjuna vónaði eg, at eg fór at vera tann hepna. Og tá føroyska Margreta ringdi til mín við boðunum um, at eg var hepni vinnarin, kundi eg ikki annað enn gleðast og hugsaði, at hetta var tann besta gávan eg kundi fáa á oljumessuni, sigur ein avgjørd og glað Cecilie, sum dagliga arbeiðir hjá norska felagnum Petrolink. Troyggjan er bæði smart og lekkur og perfekt til mín leggur hon aftrat. Tað var Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, sum dróg vinnaran. Enn ein Guðrun & Guðrum troyggja er at vinna millum tey, sum vitja ella koma framvið føroyska básin. Hetta er so ein eitt sindur øðrvísi og bleytari vinningur enn teir flestu aðrir básar hava á framsýningini, sum eru av tí vátara slagnum. Mynd - Norska Cecilie, sum vann troyggju frá Guðrun & Guðrun á føroyska básinum á oljumessuni í Stavanger saman við Margretu Jacobsen frá Uttanríkistænastuni á Løgmansskrivstovuni. Her er hon saman við Johan Dahl, oljumálaráðharra og føroyskum luttalarum á básinum. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller NB - Sí myndafrásøgn frá oljumessuni á oljan.fo niðast til høgru á síðuni.